## Bankar áhuga í Íslandi

Íslendski handilsmálaráðharrin, Gylfi Magnússon, sigur seg hava góðar vónir um, at útlendskir bankar og fíggingarfeløg fara at gera íløgur í Íslandi, nú stjórnin og Altjóða Gjaldoyragrunnurin IMF eru liðug at endurskoða búskaparstøðuna og at meta um útlitini. Samstundis eru stjórnin og IMF samd um at samstarva til mai í 2011 heldur enn november næsta ár sum upprunaliga ætlað. Á tíðindafundi í Reykjavík í gjár segði Gylfi Magnússon, at hann veit um útlendskar bankar og grunnar, sum fyrireika seg til at gera íløgur í Íslandi, men sum hava bíðað eftir einari semju millum stjórnina og IMF.



## Danska vinnan á knøunum

Nýggj tøl hjá donsku hagstovuni geva eina skakandi mynd av, hvussu meint altjóða kreppan hevur rakt tað danska vinnulívið. Har sæst millum annað, at átta teir fyrstu mánaðirnar í ár var umsetningurin í vinnuni 1.909 milliardir krónur ímóti 2.238 milliardum somu mánaðir í fjør. Afturgongdin er 14,7 prosent. Tølini vísa, at afturgongdin hevur verið serliga stór í byggivinnuni, sum hevur mist 21,6 prosent av sínum umsetningi. Innan handils- og flutningsvinnuna er afturgongdin góð 17 prosent, í ídnaðinum 14,4 prosent og í landbúnaðinum smá 10 prosent, skrivar Ritzau.

## Áhoyrari í Føroya Rætti føldi seg hóttan

**Løgreglan kannar nú eftir um ein ákærdur í Føroya Rætti eisini skal ákærast fyri at hava hótt ein áhoyrara**

RÆTTARMÁL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Týsdagin var ein maður í Føroya Rætti, har hann varð ákærdur og dømdur fyri at hava bukað konu sína av, soleiðis sum vit greiddu frá í Sosialinum í gjár.

Men nú kann tað henda, at hann verður ákærdur eina ferðina afturat.

Løgreglan kannar nú eftir um maðurin eisini skal ákærast fyri at hava hótt ein áhoyrara, sum var í rættinum hendan dagin.

Mitt undir eini avhoyring gjørdi maðurin nakrar faktir við arminum sum fekk ein áhoyrara til at føla seg hóttan.

Áhoyrarin meldaði tilburðin fyri løgregluni og løgreglan staðfestir, at tey nú eru í ferð við at kanna málið.

Nú skulu tær neyðugu avhoyringarnar gerast og so verður støða tikin til um ákæra skal reisast ímóti manninum, sigur Bergleif Brimvík, leiðari á kriminaldeildini.

Áhoyrarin var ikki vitni í málinum. Hevði talan verið um eitt vitni, sum varð hótt, hevði støðan verið heilt øðrvísi. Tað hevði verið álvorliga skerpandi, tí dómsvaldið góðtekur undir ongum umstøðum, at vitni eru fyri ágangi av nøkrum sum helst slag og að er fyrr komið fyri, at fólk eru dømd mánaðir í geglinum bara fyri at hava tosað við eitt vitni.

# Ung og eldri fylla tangan í Vágs Kirkju

**Í annaðkvøld verður pitstop kirkja í Vági har ung og eldri kunnu koma í kirkju at fylla sær tangan**

PITSTOP
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld klokkan 22 verður eitt sermerkt kvøld í Vágs Kirkju, har ung sum eldri kunnu koma í kirkju til eina rættiliga øðrvísi gudstænatu, enn tey eru von við.

Hetta er eitt tiltak í tey nevna pitstop-kirkja.

Pitstop er eitt heiti, sum er kent úr kappkoyring, og tað er tá ið bilarnir fara úr kappingini at fylla á tangan, skifta dekk og annað.

Í hesum føri skal heitið sjálvandi takast í yvirførdum týdningi.

- Pitstop staðið við áfylling, dagføring og kunning og sum ger tann vitjandi skikkaðan til at halda leiðina fram, sigur Símun P. Jacobsen, prestur í Hvalba, ið stendur fyri tiltakinum í annaðkvøld, sum Finn Johannesen og onnur eisini hava verið við at taka stig til.

- Tað er akkurát hetta sum ætlanin er við pitstop kirkjuni fríggjakvøldið, at tey vitjandi fáa høvi til at stegða á, fáa fylt á tangan, verða kunnað og soleiðis fáa íblástur til at halda leiðina fram, sigur prestur.





*Símun P. Jacobsen, prestur í Hvalba, hevur eina rættiliga øðrvísi pitstop gudstænastu í Vági fríggjakvøldið, har hann vónar at hitta nógv ung sum eldri, og har tveir kendir føroyingar fara at fortelja, hvar teirra pitstop er og, hvussu tey løða battaríið til næstu avbjóðingarnar*

### Ekkó-bøn og pitstopp

Á skránni á pitstop kvøldinum er felagssangur, kvirra, ekkó-bøn og sangur, har Eyðbjørn Jacobsen úr Klaksvík fer at syngja og spæla.

Eitt serligur partur av kvøldinum verður, tá ið tvey kend fólk fara at greiða frá, hvat teirra pitstop er.

Hann vil ikki avdúka, hvørji tey eru, men tey eru bæði tvey almenn kend og sera áhugaverd fólk.

Annað fólki er ein ung kvinna og hitt fólki er ein tilkomin maður og Símun P. Jacobsenfer at tosa við tey um, hvussu tey gera fyri at fylla á tangan og, hvussu tey løða battaríið til næstu avbjóðingarnar.

- Tað kann verða so ymiskt, hvussu fólk fylla sær tangan, summi lurta eftir tónleiki, onnur fara í kirkju ímeðan uppaftur onnur finna frið við at brúka eina løtu úti hjá seyðinum.

Í hesum sambandi verður eisini komið inn á at halda hvíludagin heilagan í týdninginum av at fáa sálarliga og likamliga hvíld.

- Spurningurin er um hvørji pitstopp ymisk fólk hava. Men tað er sanniliga eisini ein spurningur um fólk hava nakað pitstopp yvirhøvur, ella um tey bara koyra á alla tíðina.

Men tað sosiala verður heldur ikki gloymt og eftir tiltakið verður ábit og hugni á skránni.

### Ung og eldri

Símun P. Jacobsen sigur, at hetta er fyrstu ferð, at eitt slíkt tiltak verður roynt og tí er hann spentur upp á, hvussu tað fer at hilnast.

- Eg gleði meg til fríggjakvøldið har eg vóni at koma á tal við nógv menniskju og vísa at tað andaliga hevur alstóran týdning, og at boðskapurin, klæddur í nýggjan ham, kann avgjørt hava jaliga ávirkan, sigur prestur.

Hann sigur, at hóast tiltakið er eitt fríggjakvøld, er tað als ikki bara fyri ung, tí hann vónar eisini at síggja mong eldri í kirkjuni hetta kvøldið.

Men av tí, at hann ikki enn veit, hvussu aldurssamansetingin verður, hevur hann heldur ikki skrivað sær eina lidna talu, tað verður alt eftir, hvør kemur, sigur hann.

Men undir øllum umstøðum verður talan um eina stutta, óformliga andakt, har tað mest verða hini innsløgini, sum fylla karmarnar.